



*Sigrún og Anna Guðný hava havt eitt gott samstarv, síðani tær vóru á skúla í London og hava hildið konsertir á Íslandi og aðrastaðni eitt nú í London, Tokyo og U.S.A.*
*Á konsertini leygardagin verða bæði íslendskir sangir/løg og klassiskir sangir/løg at hoyra.*

# Íslendska diddú í Norðurlandahúsinum

*Leygardagin 22. januar 2000 kl. 16.00 fer íslendska Sigrún Hjálmtýsdóttir, ella Diddú, sum hon verður nevnd á Íslandi, at hava konsert í Norðurlandahúsinum. Við sær á ferðini til Føroyar hevur Sigrún Ónnu Guðný Guðmundsdóttir, sum spælir á klaver*

Eitt sindur um tær báðar: Sigrún Hjálmtýsdóttir, Diddú byrjaði sína sangkarrieru í tí kenda og væl umtókta bólkinum Spælibólkur Tjóðarinnar, á Íslandi. Hon var næmingur á Tónlistaskúlanum í Reykjavík, fór síðani til London á Guildhall School of Music & Drama, hiðani hon tók prógv sum solosangari og sangpedagogur. Síðani fór Sigrún til Italien, har hon luttók í sangkappingum og vann virðislønir. Somuleiðis hevur hon havt nógvar konsertir bæði á Íslandi og í øðrum londum og hevur eisini sungið solo saman við Sinfóniuhljómsveit Íslands, Íslendsku hljómsveitinni, Kamarsveit Reykjavíkur. Sinfóniuhljómsveit Norðurlands og saman við orkestrum uttanlands. Sigrún Hjálmtýsdóttir hevur eisini havt leiklutir á filmi og hevur eisini verið við í sendingum í sjónvarpi. Hon hevur sungið við í fleiri operaum, ikki bara á Íslendsku Óperunni og í Tjóðleikhúsinum, men eisini í Noregi og Svøríki. Fyri stuttum hevur hon havt konsertir í London, Finnlandi, Baltikum, Japan og í Italien. Í 1996 fekk Sigrún Hjálmtýsdóttir íslendska »Riddarakross Hinnar Íslendsku Fálkaorðu« fyri arbeiði sítt. Sigrún hevði eisini ein av høvuðsleiklutunum í operettuni Flogmúsini, sum var í Norðurlandahúsinum í mai 1999.

Nakrar fløgur við sangum hjá Sigrún eru givnar út. Tann nýggjasta »Klassík« kom út í fjør vár.

Anna Guðný Guðmundsdóttir er útbúgvin frá Tónlistaskúlanum í Reykjavík og á Guildhall School of Music & Drama í London. Hennara útbúgving hevur verið innan kamartónleik og at spæla undir hjá sangarum. Anna Guðný hevur arbeitt á Íslandi tey síðstu 16 árini. Sum solistur hevur hon spælt í Simfoníuhljómsveit og hevur spælt verk eftir Mozart, Beethoven og Mendelsohn umframt í Des Canyons aus Étoles og Turangalia eftir Messiaen undir leiðslu af Paul Zukofsky. Anna Guðný hevur spælt á nógvum kamarkonsertum á Íslandi og í útlandinum og á nógvum fløgum. Anna Guðný arbeiðir nú sum free-lance tónleikari hjá Sinfóníuhljómsveit Íslands og undirvísir á Guðný arbeiðir nú sum free-lance tónleikari hjá Sinfóníuhljómsveit Íslands og undirvísir á Tónlistarskúlanum í Reykjavík.

Sigrún og Anna Guðný hava havt eitt gott samstarv, síðani tær vóru á skúla í London og hava hildið konsertir á Íslandi og aðrastaðni eitt nú í London, Tokyo og U.S.A.

Á konsertini leygardagin verða bæði íslendskir sangir/løg og klassiskir sangir/løg at hoyra.

# James Olsen Band í Badmintonhøllini leygarkvøldið

*Leygarkvøldið fara James Olsen Band á pall í Badmintonhøllini í Havn*



JÁKUP BOGI JOENSEN

Leygarkvøldið verður skipað fyri stórum tiltaki í Badmintonhøllini í Havn. James Olsen Band fer at spæla til konsert og dans. James Olsen hevur seinastu tíðina verið í Danmark, og har hevur hann spælt við nógvum kendum tónleikabólkum.

Aftrat sær leygarkvøldið hevur James nakrar av teimum heilt garvaðu tónleikarunum í føroyskum høpi. Ólavur Øster á guitarinum, Pauli Magnussen á bass, Jógvan Olsen á ljómborð, og aftan fyri trummurnar fer Brandur Jacobsen at sita. Sangin fer James sjálvur at taka sær av.

Hetta er fyrsta tiltaki av sínum slagi í ár, og vóna fyrireikaranir, at nógv fólk fara at leita sær niðan í Badmintonhøllina leygarkvøldið.

Dyrnar lata upp klokkan 23 og kostnaðurin er einans 100 krónur.

Fríggjakvøldið spæla James Olsen Band í Kagganum í Havn.



# Stór krøv til fullveldisætlanina

*Høgni Hoydal sigur ongan iva vera um, at størsta grundgevingin ímóti fullveldisætlanini er óskilið á almanna- og heilsuøkinum*

JOHN JOHANNESSEN

– Eg eri púra samdur við atfinningunum hjá Miðflokkinum um, at størsta grundgevingin ímóti fullveldisætlanini er stóra óskilið, ið hevur verið á almanna- og heilsuøkinum seinastu tíðina.

Høgni Hoydal sigur, at samgongan hevur noterað sær atfinningarnar, Miðflokkurin kom við á seinasta kaffifundinum millum Miðflokkin og samgonguna í politisku prosesessini í fullveldismálinum. Hesin fundurin varð hildin týsdagin.

Sambært útvarpstíðindunum á middegi mikudagin, hevur Miðflokkurin gjørt greitt fyri landsstýrinum, at hann ikki kann góðtaka ta framferð, landsstýrið hevur víst í pensjónsmálinum og viðvíkjandi sparingunum innan heilsuverkið. Somuleiðis hevur Miðflokkurin gjørt vart við, at hesin politikkur kann vera til bága fyri fullveldisætlanini.

## Má ikki henda

– Vit mugu staðfesta, at slíkt, sum nú er farið fram, ikki má henda. Skulu vit taka ábyrgd fyri sjálvbjargnum Føroyum, mugu vit eisini vísa ábyrgd.

Høgni Hoydal ásannar, at óskilið við nýggju pensjónslógini og rokið á Landssjúkrahúsinum er ógvuliga óheppi. Men hann lovar, at landsstýrið nú fer at leggja seg eftir at fáa skil á hesi viðurskifti, somuleiðis sum landsstýrið skal tryggja sær, at slíkt ikki hendir aftur.

– Hóast eg eri púra samdur við, at handfaringin hevur verið skeiv í hesum málinum, eri eg ikki samdur við teimum, ið siga fullveldisætlanina vera orsøkina til trupulleikarnar.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum greiðir frá, at politiska endamálið allatíðina var at hækka pensjónina og at veita sjúkrahúsunum betri kor. Tað, sum eftir hansara tykkið er galið, er umsitingarliga handfaringin av málunum.



*Høgni Hoydal er samdur við Miðflokkinum í, at óskilið á almanna- og heilsumálastýrinum ikki er gott fyri fullveldisætlanina*

## Hørð krøv

– Vit mugu ásanna, at krøvini til hetta landsstýrið eru harðari enn krøvini hava verið til onnur landsstýri. Vit hava sett okkum sjálvbjargni sum mál, og tí má landsstýrið syrgja fyri, at vit eru før fyri at gerast sjálvbjargin, sigur Høgni Hoydal.

# Kannar ikki málið

*Hóast grundgevingarnar hjá Jákupi Mørkøre um, at hann bert gjørdi sína skyldu, tá hann segði starvsfólkunum upp, ætlar løgmaður sær ikki at kanna, um uppsøgnin av sjúkrahússtjóranum var grundað*



*Løgmaður ætlar sær ikki at kanna, um uppsøgnin av sjúkrahússleiðaranum var grundað*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður hevur ongar ætlanir um at kanna, um uppsøgnin av sjúkrahússtjóranum var grundað. Hann vísir á, at tað er landsstýriskvinnan, ið eigur málið, og hann fer ikki at gera nakað við tað, fyrr enn talan er vorðin um ein konkreta kæru.

Jákup Mørkøre hevur fyri fjølmiðlunum og í skrivi til Almanna- og Heilsumálastýrið gjørt greitt, at hann góðtekur ikki uppsøgnina. Hann gjørdi bara sína skyldu og hevði einki annað val, enn at siga fólkum upp, tá hann ikki slapp at søkja um meirjáttan og skuldi spara tríggjar milliónir krónur.

Somuleiðis hevur Bjørn á Heygum, advokatur, sagt, at málið sær út, sum at landsstýriskvinnan vaskar hendurnar og turkar skittin upp í Jákup Mørkøre, fyri at sleppa undan politiskum roki.

## Órættvís handfaring

Løgmaður hevur ongar viðmerkingar til, um hann heldur uppsøgnina vera grundaða ella ikki. Hann sigur tó, at hann, sum løgmaður, ikki kundi liva við, at starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum vórðu handfarin soleiðis av sjúkrahúsleiðaranum, sum tey vórðu. Hann vísir á, at uppsagnirnar vóru í stríði við almenna uppsagnarpolitikkin.

Løgmaður stendur tískil fast við, at hann ikki góðtók atburðin hjá sjúkrahúsleiðaranum, men hann vil ikki siga, um uppsøgnin av Jákupi Mørkøre var rætta úrslitið av málinum.

– Eg kenni ikki allar smálutirnar í málinum, og kann tí ikki gera viðmerkingar til tað, sigur løgmaður.

Tó er greitt, at uppsøgnin av sjúkrahúsleiðaranum kom stutt eftir, at løgmaður fyri internetsosialinum hevði meldað út, at nú kundi hann ikki góðtaka støðuna á Landssjúkrahúsinum, og tí mátti okkurt henda.

## Stór avbjóðing

Í málinum um sparingarnar á Landssjúkrahúsinum og um uppsøgnina av Jákupi Mørkøre, sjúkrahúsleiðara, hevur fleiri ferðir verið víst á truplu støðu hansara at fáa Landssjúkrahúsið at virka við ov lágari játtan.

Spurningurin til løgmans er tískil, um vánaligu korini hjá almennum stjórum í Føroyum ikki gera, at áhugin fyri slíkum størvum millum væl skikkað fólk fellur, og at tað tískil verða minni skikkað fólk, ið ikki fáa starv privatu vinnuni, ið søkja leiðandi størv innan almennu umsitingina.

Anfinn Kallsberg ásannar, at tað er ógvuliga trupult at virka, sum almennur stjóri og embætismaður í Føroyum. Nógvar lógir, reglugerðir og strammar játtanarskipanir eru at halda seg til.

– Tað krevur sín mann at vera almennur stjóri, men júst hetta ger starvið til eina stóra avbjóðing, sigur løgmaður og sipar til, at áhugin tískil ikki er so lítil kortini.

## Úr Løgtinginum



# Seks mál á skránni í dag

JOHN JOHANNESSEN

Tvær atkvøðugreiðslur um fyrispurningar, ein fyrsta viðgerð, ein onnur viðgerð, svar upp á fyrispurning og framløga. Hetta er skráin fyri tingfundin, sum verður settur í dag klokkan hálvgum tvey seinnapartin.

Tær báðar atkvøðugreiðslurnar um fyrispurningar eru ávíkavist um fyrispurning frá Jákupi Sverra Kass til løgmans viðvíkjandi núverandi valskipanini.

Fyrsta viðgerðin er av tingmáli nummar 37/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu. Hetta er mál, ið Dan Reinert Petersen, løgtingsmaður, hevur lagt fyri tingið vegna Javnaðarflokkin.

Onnur viðgerðin er av tingmáli nummar 21/199, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum. Hetta er mál, ið Høgni Hoydal, landsstýrismaður, hevur lagt fyri tingið vegna landsstýrið.

Áðrenn framløgurnar skal Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, svara uppá fyrispurning frá Finni Helmsdal, løgtingsmanni, um fyribyrging móti tubbaksnýtslu.



# Fáa koyrikortið fyrr aftur

JOHN JOHANNESSEN

Javnaðarflokkur heldur, at tey, sum vegna rúsdrekkakoyring hava mist koyrikortið í 3 ár ella meira, skulu hava møguleika at fáa koyrikortið aftur, um tey hava yvirhildið eina eftiransaða viðgerð móti rúsdrekkamisnýtslu.

Tískil hevur Javnaðarflokkurin lagt fyri tingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu. Uppskotið kemur til fyrstu viðgerðar á tingfundinum í dag.

Javnaðarflokkurin vísir í viðmerkingunum til uppskotið á, at vónin er, at viðgerð í staðin fyri fangahús og afturútvegan av koyrikortinum við ávísum treytum skal hava við sær færri endurtøkur av rúsdrekkakoyring hjá sama bilførara. Tí hevur flokkurin lagt fram uppskot um at broyta stykki 2 í grein 59e í ferðslulógini, so hon verður soljóðandi:

»Er koyrirætturin frádømdur vegna rúsdrekkaella promillukoyring, kann spurningurin um at fáa koyrirættin aftur leggjast fyri dómstólarnar, tá helvtin av frádømingartíðini - tó í minsta lagi eitt ár - er fráliðið. Um koyrirætturin í sovorðnum førum er frádømdur fyri allar tíðir, kann spurningurin um at fáa koyrirættin aftur í fyrsta lagi leggjast fyri dómstólarnar, tá ið 5 ár av frádømingartíðini eru fráliðin. Koyrirætturin kann einans fáast aftur, um viðkomandi í minst 1 ár frammanundan, at málið verður lagt fyri rættin, hevur yvirhildið eina eftiransandi viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.«